## Betri viðgerð ímóti bróstkrabba

Sum er fáa millum 20 og 30 prosent av teimum, sum fáa kemoviðgerð fyri bróstkrabba, gagn av viðgerðini. Hini fáa ikki annað enn hjáárin burturúr. Men nú hava danskir granskarar funnið eina loysn, sum kann geva fleiri sjúklingum hjálp. Eitt nú eru granskararnir komnir eftir, at ávísur heilivágur ger ikki mun hjá fólki, sum hava eitt ávíst gen á 8. kromosomi. Við at staðfesta tað fyrst ber til at viðgera hesar sjúklingarnar við einum øðrum slagi av kemoterapi. Tað ger eisini, at teir sleppa undan teimum óhepnu hjáárinunum, skriva granskararnir í tíðarritinum Nature Medicine.



## Endurgjald fyri gassleiðing

30 fiskimenn á Bornholm vilja hava endurgjald frá einum felagi, sum hevur lagt eina gassleiðing eftir botninum í Eystrasalti. Nord Stream hevur sagt, at tað er sinnað at rinda endurgjald, um gassleiðingin skerjir møguleikarnar hjá fiskimonnunum. Nú hevur felagið fingið umsóknir frá 83 fiskimonnum, og teirra millum eru 30 danskir, sigur DR. Nord Steam hevur tingast við danska fiskimannafelagið, og endurgjaldið er sett til 175.000 krónur. Fiskimannafelagið sigur, at menn gera sjálvir av, hvussu teir brúka pengarnar.

# Sigur seg sjálvt at lønin má upp

**Lønarhækkingar og uppsagnartíðir eru nøkur av krøvunum, sum arbeiðarafeløgini hava sett arbeiðsgevarunum, nú gongd so smátt er við at koma á sáttmálasamráðingarnar**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er blivið nógv dýrari at liva so sjálvandi skal lønin upp, segði Ingeborg Vinter, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag á aðalfundi felagsins um vikuskiftið*

- Tað sigur seg sjálvt, at lønin má upp

Tað var boðskapurin hjá Ingeborg Vinther forkvinnu, til tey, sum vóru møtt á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskifti.

Hóast hon vísti á, at partarnir hava avtalað ikki at almannakunngera krøvini, kundi hon yvirskipað upplýsa, at lønarhækking er eitt av krøvunum, sum er sett fram, nú samráðingarnar eru byrjaðar.

Men hon ásannar, at tað verður ikki lætt, sum tíðirnar eru.

Hinvegin staðfestir hon, at øll 30 árini, hon hevur verið við í samráðingunum, hava tey altíð hoyrt, at ráð eru ikki til lønarhækkingar.

- Vit vita væl, at nøkur virki klára seg illa, men vit vita eisini, at nógv hava megnað at goldið eigarunum vinningsbýti, hóast um tey gremja seg um ringar tíðir.

- Heldur enn at leggja til viks til verri tíðir ella seta pening av til útbygging, er peningurin tikin úr virkinum sum vinningsbýti.

- Hví skulu vit so taka synd í teimum og lata vera við at krevja lønarhækking, spyr Ingeborg Vinther.

### Nógv dýrari

Hon staðfestir, at síðan seinasti sáttmálin varð gjørdur í 2007, er vorðið nógv dýrari at liva. Oljan kostar meira, um ikki so nógv sum í 2008. Allar vørur eru dýrkaðar og tað koma alt fleiri brúkara gjøld frá tí almenna, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at uppsagnartíðirnar er eisini eitt mál, sum fer at verða reist í samráðingunum.

- Vit hoyra dagliga um uppsagnir og í nógvum førum verða uppsagnarreglurnar ikki hildnar. Eitt, sum verður nýtt sum umbering fyri, at fólk ikki skulu fáa uppsagnarløn í uppsagnartíðini, er reglan í sáttmálanum, ið sigur, at hetta er ikki galdandi, tá ið rávørutrot ella ólagaligt veður er.

- Serliga hetta við rávørutroti verður nýtt alla tíðina, tá ið talan er um uppsagnir á fiska- og laksavirkjum. Men tá ið fólk samstundis fáa boð um at møta til arbeiðis í uppsagnartíðini, kann tað ikki vera rávørutrot, so hetta kann als ikki góðtakast, og tí fer felagið ikki at lata fara framvið, at fiskavirkisskipanin verður misnýtt.

Tí er eitt krav í sáttmálasamráðingunum, at uppsagnartíðin má leingjast, og eisini má reglan um rávørutrot og veður fáast burtur, staðfestir Ingeborg Vinther í formansfrágreiðing síni á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag.

# Vilja hava frí á ólavsøku

**Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sýtir fyri at kalla ólavsøkuna fyri tjóðarhátíð okkara so leingi tey tímaløntu kring landið ikki eisini fáa frí við løn, akkurát sum tey við almennari løn**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- So leingi tað bara eru tey alment løntu og onnur við fastari løn, sum fáa frí á ólavsøku, uttan at missa løn, kann ólavsøkan ikki kallast tjóðarhátíð føroyinga.

Tað er niðurstøðan á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Har vóru tað fleiri sum fýltist á, at tímalønt fólk kring landið fingu ikki frí á Ólavsøku.

Og taka tey sær frí, missa tey lønina.

Samstundis hava tey alment løntu frí alla ólavsøkuna við fullari løn.

Hjá teimum tímaløntu í Havn er ólavsøkuaftan hálvur frídagur og ólavsøkudagur er heilur frídagur.

Av tí sama er heldur onki fiskaarbeiði á virkjunum í Havn á ólavsøku og tí verður flakafólkið kring landið undirdíkt í fiski, sum onkur tók til, ímeðan tey í Havn halda ólavsøku.

Ingeborg Vinher sigur, at tey hava onkuntíð roynt at reisa spurningin í sáttmálasamráðingum.

Men tað hevur verið sópað av borðinum.

Tí verður ásannað, at tað nyttar lítið at taka spurningin fram aftur í sáttmálasamráðingum.

Men tað merkir ikki, at tey hava slept málinum.

- Skal nakað henda á hesum øki, krevst lógarbroyting og hana kunnu bara politikarar okkara seta í verk, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tey tí fara at seta seg í samband við politiska myndugleikan og biðja hann bera so í bandi, at ólavsøkan verður frídagur um alt landið, við løn.

Men sálvandi skal sjúkrarøkt, eldrarøkt og annað neyðugt arbeiði eisini gerast á ólavsøku.

Ikki fyrrenn tá kann hon kallast tjóðarhátíð okkara, var niðurstøðan á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon nevnir í eini viðmerking, at møguliga kundi tað borið til at stovna ein halgidagsgrunn, sum gav tímaløntum lønarendurgjald fyri ymsar frídagar.

## Vilja hava hægri rentu frá bankunum

**Lokalfeløgini í Føroya Arbeiðarafelag vilja hava hægri frá bankunum upp á frítíðarlønina, sum er einar 300-500 milliónir um árið**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroya Arbeiðarafelag fer nú at kanna møguleikarnar fyri at fáa hægri rentu frá bankunum fyri frítíðarlønina hjá limunum.

Tað er ein niðurstøða á aðalfundinum hjá felagnum um vikuskiftið.

Har varð ført fram, at útreiðslurnar til TAKS av at umsita frítíðarlønina hjá limunum er nógv størri enn tær rentuinntøkur, sum feløgini fáa av at hava peningin standandi á bók, staðfestir Harry Benjaminsen, formaður í Tofta Arbeiðarafelag.

Orsøkin er sjálvandi tann, at rentustøðið er munandi lækkað seinastu árini.

Sostatt hava lokalfeløgini hjá Føroya Arbeiðarafelag beinleiðis útreiðslur av frítíðarlønini.

- Tilsamans er frítíðarlønin einar 300-500 milliónir, so tað átti at borið til at samráðst seg fram til eina hægri rentu frá onkrum peningastovni, legði hann afturat.

Koma øll hini feløgini í Samtaki við, er talan um enn meir.

Tí fer nevndin í Føroya Arbeiðarafelag nú at kanna møguleikarnar fyri at fáa eitt heildartilboð frá onkrum peningastovni.

Sum støðan er nú, stendur frítíðarlønin á kontu í navninum á fakfeløgunum, so at tað fær rentuinntøkurnar, men tað er TAKS, sum umsitur konturnar.

Onkur nevndi eisini møguleikan fyri, at fakfeløgini tóku á seg umsitingina av frítíðarløini frá TAKS.